# Býráðsfundur 27.11.2023

**<u>Býráðsfundur 27.11.2023 kl. 18.00</u>**

Fundarstað: Fundarhølið

| | | |
|---|---|---|
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | Avboð |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | Avboð |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 92/2023 – Innrætta stovu í Frítíðarskúlanum | ALMENT |
| Mál nr. 93/2023 – Meirveitingar viðv. umvæling av Alis- og evnastovuni | ALMENT |
| Mál nr. 94/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Nes kommuna 3.viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 95/2023 – Reguleringar til fíggjarætlanina 2023 1. viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 96/2023 – Nevndarvikur og býráðsfundir 2024 | ALMENT |
| Mál nr. 97/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 98/2023 – | AFTURLATIÐ |

**<u>Mál nr. 92/2023 – Innrætta stovu í Frítíðarskúlanum ALMENT</u>**

<u>J.nr.: 1802-7-2022</u>

Tilboðini uppá ávikavist byggiarbeiði, HVS og ventilatitón og EL til endastovuna í norðurendanum av Frítíðarskúlanum eru nú tøk.

Byggiarbeiði varð boðið út, meðan HVS og EL arbeiðstøkurnar blivu bodnar til somu fyritøkur, ið frammanundan hava gjørt hesi arbeiði í bygninginum, ávikavist Blikksmiðjan og HD elektric.

Fuglark hevur gjøgnumgingið innkomnu tilboðini og mælir kommununi at taka av.

| | |
|---|---|
| Byggiarbeiðið: | KBH Byggivirkið |
| HVS og ventilatión: | Blikksmiðjan |
| El-arbeiðið: | HD-el |

Tað er týdningarmikið, at arbeiðið kann byrja til ásettu tíð og avhendast sambært ásetingunum í útboðnum.

Tekniski leiðarin hevur tí givið Fuglark boð um at gera arbeiðstakarasáttmálarnar og skjøl í hesum sambandi klár, soleiðis at skrivast kann undir, tá ið formliga játtanin er tøk.

Málið er eisini viðgjørd í fleiri umførum bæði í Teknisku- eins og Trivnaðarnevndini

**Á fundi, tann 21.11.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðunum frá nevndu veitarum á tilsamans kr. 582.456,07, og at fíggingin verður tikin av stovninum "Frítíðarskúlin íløga".**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 93/2023 – Eyka útreiðslur viðv. umvæling av Alis- og evnafrøðistovuni ALMENT**
J.nr.: 1901-1-2023

Niðurtøkuarbeiðið í samband við ger av nýggjum alis- og evnafrøði hølum í Tofta skúla er í gongd, og tað gongur væl.

Undir niðurtøkuni er staðfest, at veggir, ið sambært útbjóðaða prosjektinum, vórðu lecaveggir, í veruleikanum eru betongveggir. Tað førir við sær, at niðurtøkuarbeiðið er munandi meira arbeiðskrevjandi og kostnaðarmikið enn roknað varð við í upprunatilboðnum.

Ástaðarfundur hevur verið í skúlanum í samband við hetta. Á fundi vóru umboð frá arbeiðstakaranum eins og byggileiðslu. Arbeiðstakarin hevur eftir ynski frá umboði kommununar (byggileiðsluni) roknað nýggjan prís fyri niðurtøku av veggunum. Tað er gjørt í støði í broyttu fyritreytunum.

Sambært teldupostinum hesum viðvíkjandi verður staðfest, at broytingin í niðurtøkuni av veggunum hevur ein meirkostnað.

Í samband við niðurtøku av loftum vm. er harafturaft staðfest, at verandi vatnleiðingar, ið nú eru sjónligir, eru illa tærdar og mugu skiftast.

Ástaðarfundur hevur verið millum Renovent og kommununa t. 14.11.2023, fyri at staðfesta, hvussu umfatandi ítøkiliga arbeiðið er, og júst, hvat tørvur er á at skifta í hesum umfari.

Renovent hevur sent kommununi kostnaðarmeting fyri arbeiðið at skifta tærdu rørini í teimum rúmum, har tað slepst frammat teimum í samband við niðurtøkuna.
Renovent hevur givið tilboð fyri tilfar og arbeiðsløn.

Rørini mugu skiftast, tí teringin er somikið umfatandi. Tí mælir tekniski leiðarin til at játtað verður henda eykaupphædd, eins og avsett verður til ókend viðurskifti í hesum sambandi.

Sjálvt arbeiðið verður avgeitt í samráð millum byggileiðsluna, KBH og Renovent.

**Á fundi, tann 21.11.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðunum frá KBH og Renovent. Somuleiðis verður mælt til at seta eina upphædd av til ókend viðurskifti. Fíggjarnevndin mælir til at játta tilsamans kr. 220.300 u/mvg. Fíggingin verður tikin av stovninum "Nýggi skúli íløga".**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 94/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Nes kommuna 3.viðgerð ALMENT**
J.nr.: 1107-2-2023

Fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2024 var fyri á býráðsfundi 25.09.2023, og onnur viðgerð var fyri á býráðsfundi 31.10.2023.

**Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til 3. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2024, hjá Nes kommunu, eftir broytingar vera hesi:**

| **Rakstur tkr.** | **2024** | **2023 v/eykaj.** |
|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 6.849 | 6.423 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 25.553 | 22.584 |
| §3 Børn og ung | 15.977 | 14.752 |
| §4 Undirvísing | 5.129 | 5.135 |
| §5 Mentan og frítíð | 6.904 | 5.602 |
| §6 Teknisk mál | 7.820 | 6.994 |
| §7 Kommunalt øki | 3.876 | 4.110 |
| **Rakstur í alt** | **72.108** | **65.600** |
| | | |
| **§20 Inntøkur v.m.** | **79.205** | **72.537** |
| | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **7.097** | **6.936** |
| | | |
| **Íløgur tkr.** | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 47 | 70 |
| §3 Børn og ung | 1.320 | 350 |
| §4 Undirvísing | 2.500 | 2.600 |
| §5 Mentan og frítíð | 4.540 | 8.885 |
| §6 Teknisk mál | 5.280 | 1.757 |

| | | |
|---|---:|---:|
| §7 Kommunal virki | 3.846 | 12.338 |
| **Íløgur í alt** | **17.533** | **26.000** |
| | | |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **-10.436** | **-19.063** |
| | | |
| **Afturgjald av skuld** | **2.910** | **2.910** |
| | | |
| **Av tøkum peningi** | **846** | **4.973** |
| | | |
| **Lántøka** | **12.500** | **17.000** |

**Á fundi 27.10.2023 mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður hækkaður frá kr. 5.500 til kr. 6.000.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Á fundi 27.10.2023 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við 2. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2024 soleiðis, sum hon er uppsett.**
**Íløgurnar á tkr. 17.655 og afturgjald av skuld á tkr. 2.910, tilsamans tkr. 20.565, verða fíggjaðar við rakstaravlopið á tkr. 7.857, lántøku á tkr. 11.000 og tøkum peningi á tkr. 1.707.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Á fundi 21.11.2023 mælir Fíggjarnevndin til við 3. viðgerð, at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður hækkaður frá kr. 5.500 til kr. 6.000.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt við 3. viðgerð.**

**Á fundi 21.11.2023 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við 3. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2024 soleiðis, sum hon er uppsett.**
**Íløgurnar á tkr. 17.533 og afturgjald av skuld á tkr. 2.910, tilsamans tkr. 20.443, verða fíggjaðar við rakstaravlopið á tkr. 7.097, lántøku á tkr. 12.500 og tøkum peningi á tkr. 846.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt við 3. viðgerð.**

# Býráðsfundur 27.11.2023

**Mál nr. 95/2023 – Reguleringar til fíggjarætlanina 2023 1. viðgerð ALMENT**
J.nr.: 1107-2-2022

Reguleringar á fíggjarætlanini 2023 – 1. viðgerð.

Fyrisitingin hevur gjøgnumgingið raksturin higartil í ár, framroknað árið 2023 og samanborið við løgdu fíggjarætlanina fyri 2023. Fyrisitingin mælir til fylgjandi reguleringar á fíggjarætlanini fyri 2023:

| **Rakstur** | **tkr.** |
|---|---:|
| §1 Kommunal Fyrisiting | -450 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | 150 |
| §3 Børn & Ung | 300 |
| §4 Undirvísing | 0 |
| §5 Mentan & Frítíð | 350 |
| §6 Teknisk mál | 900 |
| §7 Kommunal virki | -300 |
| **Rakstur í alt** | **950** |
| | |
| **Rentustuðul og Rentuútr.** | **650** |
| | |
| **Reguleringar í alt áðrenn íløgur** | **1600** |

| **Íløgur** | |
|---|---:|
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | 0 |
| §3 Børn og ung | 300 |
| §4 Fólkaskúlin | 0 |
| §5 Mentan og Frítíð | 550 |
| §6 Teknisk mál | 400 |
| §7 Kommunalt virki | 0 |
| **Íløgur í alt** | **1250** |
| | |
| **Reguleringar rakstur og íløgur** | **2.850** |

**Á fundi, tann 21.11.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við reguleringunum fyri 2023, sum tær eru uppsettar omanfyri og at fíggingin verður tikin av áður samtyktari lántøku.**

**Tilmælið hjá Fìggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 27.11.2023

**Mál nr. 96/2023 – Nevndarvikur og býráðsfundir 2024 ALMENT**
J.nr.: 1101-15-2023

Umsitingin hjá kommununi hevur gjørt uppskot til at nevndarvikur og býráðsfundir at verða ásett sum fylgjandi í 2024:

Býráðsfundir:
29. januar
26. februar
21. mars
22. apríl
27. mai
24. juni
26. august
30. september
28. oktober
25. november

Nevndarvikur:
3-4
7-8
11-12
15-16
20-21
24-25
33-34
38-39
42-43
46-47

**Á fundi, tann 21.11.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við at nevndarfundirnir og býráðsfundirnir 2024 verða sum uppsett omanfyri.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

.
.